# Føroyskir oljusheikar

**Virðið á ognunum hjá teimum, sum eiga partabrøv í Atlantic Petroleum, hevur fingið eitt ordiligt spark uppeftir seinastu vikuna**

**PARTABRØV**
*Jákup Mørk*

Fyri fáum døgum síðani kundi Sosialurin endurgeva eina greinin – analysu — av partabrævinum hjá Atlantic Petroleum. Høvuðsniðurstøðurnar í hesari vóru, at leitingarloyvini hjá felagnum vóru væl og virðiliga undirmett. Ikki minst nú stór fund eru gjørd nærhendis føroyska markinum. Hartil varð mett, at føroyska felagið alt annað líka hevur ein greiðan fyrimun, um borast skal eftir olju á føroyskum øki. Og endaliga varð staðfest, at vantandi kurshækkingar higartil einamest stavaðu frá, at íslendski marknaðurin ikki er vanur við oljupartabrøv.




*Tað líkist nærum inntøkukurvuni hjá Gíriki McGvagg, tá hugt verður at kursbroytingunum í virðisbrævinum hjá Atlantic Petroleum*

Tilmælið í greiningini var greitt. Potentielli kursurin var ikki 412, sum tá var galdandi, men 882! Og tað hevur sett ferð á handilin av føroyska virðisbrævinum í Íslandi.

**Tvífaldað í eina viku**

Síðani greiningin varð gjørd, er kursurin á partabrævinum hjá Atlantic Petroleum nærum tvfalduður. Bara mikudagin var lopið heili 41%, soleiðis at kursurin var komin upp á 804, tá marknaðurin læt aftur. Handlarnir við partabrævinum hava náttúrligt eisini upplivað eina stóra øking. Tá hesir hava verið mestir, hevur partabrævið umsett fyri 5,6 mió kr. um dagin.

Við stóra vøkstrinum hesar seinastu dagarnar, er eingin sum helst ivi um, at talan higartil hevur verið um framúr góða íløgu hjá teimum, sum hava sett pening í Atlantic Petroleum. Bara síðani seinastu partapeningshækkan hevur rentan verið 203%. Og tað er nú ikki so galið avkast innan fyri bara 13 mánaðir.






# Kjak um Dag og Viku á netinum

**Sjónvarpið býður hyggjarunum at fylgja við í teimum dagligu avgerðunum, sum liggja aftan fyri tíðindasendingarnar**

**SJÓNVARPIÐ**

Á heimasíðuni hjá sjónvarpinum ber til hjá hyggjarum at gera beinleiðis viðmerkingar til sendingarnar, og redaktørurin bindur seg til at svara dagin eftir.

Allar tíðindasendingarnar eru úrslit av valum, sum verða gjørd frá morgunstundini til sendingin fer í luftina klokkan átta um kvøldið. Summi evni – ella innsløg – siga seg næsta sjálvt, tí tey eru á dagsskránni, meðan onnur eru úrslit av einum vali, sum redaksjónin ger. Sjálvandi kunnu øll ikki vera samd um tey evnini, sum enda í sjónvarpstíðindunum, men møguleiki eigur at vea fyri at skifta orð um, hvat eru tíðindi, hvat eigur at takast við ella hvussu ein sending eigur at skipast.

Soleiðis sigur Sjónvarpið í tíðindaskrivi, nú tey hava boðið hyggjarum at fylgja við í teimum dagligu avgerðunum aftan fyri tíðindavalið.

Umframt at velja evni, sum so ella so eru áhugaverd, viðkomandi, spennandi ella týdningarmikil, so skulu fólk – fotograftur og journalistur – vera tøk. At gera sjónvarp krevur, at man er á staðnum fyri at fáa myndir. Í øðrum fjølmiðlum er ofta nakað lættari at ringja og fáa tær upplýsingar, sum skulu brúkast.

Á heimasíðuni hjá sjónvarpinum www.svf.fo – er ávísing til kjak um tær einstøku tíðindasendingarnar og møguleikin fyri opnum kjakið um evni, sum viðvíkja fjølmiðlum ella øðrum evnum, sum hava áhuga hjá hyggjarunum.

Eftir hvørja Dag og Viku skrivar redaktørurin einar 10-15 reglur um, hví sendingin bleiv sum bleiv. Tær viðmerkingarnar vera so grundarlagið fyri kjaki, viðmerkingum ella fyrispurningum.

Redaktørurin bindur seg til at svara aftur á kjakinum dagin eftir.

Fyri at vera við skal man skráseta seg einaferð við einum navni, sum kann vera rætta navnið ella eitthvørt dulnavn.